# ÍTRÓTT

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Mær vitandi, hevur einki sterkari kvinnulandslið nakrantíð vitja føroyskan flogbólt*
*Kristian Mikkelsen*

# Spælarnir krevja Frem á húsagang

**Spælarnir hjá Frem hava spælt tríggjar dystir uttan løn, og tíma nú ikki at spæla fyri einki meira**

FÓTBÓLT
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Spælarnir í danska 1. deildarfelagnum, Frem hava nú kravt felagið á húsagang.

Talsmaðurin hjá Frem-spælarunum, Tim Ilsø sigur við Ekstrablaðið, at teir hava fingið játtað frá Frem, at lønin teir eiga til góðar kemur, men teir hava einki sæð til nakran pening, og tolið hjá spælarunum er nú uppi. Spælarnir góvu felagnum eina viku til at fáa lønina og eina bjargingarætlan uppá pláss.

Tann freistin er nú farin, og tí hava spælarnir kravt felagið á húsagang. Spælarnir vóna tó kortini, at tað eydnast at bjarga Frem frá húsagangi, so teir kunnu fáa sína løn, og varðveita síni størv sum løntir fótbóltsspælarar í felagnum. Men sum støðan er, so ynska teir ikki at spæla fyri felagið, uttan at fáa løn.

Fakfelagið hjá fótbóltsspælarunum, Spillerforeningen sigur í einum tíðindaskrivi, at Frem-spælarnir fara frá fríggjadegi 12. juni at rokna, ikki at arbeiða fyri Frem meira, tí teir hava ikki fingið løn fyri maimánað, og hava onga trygd fingið fyri lønini, sum teir eiga fyri junimánað. Spillerforeningen fer nú at hjá Frem-spælarunum at melda síni samlaðu krøv til Lønmodtagernes Garantifond. Fer Frem á húsagang, so verður felagið tvangsflutt niður í Danmarkarseriuna.

## Høvdu vónað eina viku

Leiðslan í Frem hevði vónað, at spælarnir vildu givið teimum eina viku meira, áðrenn teir fóru at krevja felagið á húsagang.

- Vit bóðu spælarnar um at fáa eina viku, nú vera vit noyddir at klára alt uppá eitt samdøgur. Men megna vit at skava peningin saman, so vænti eg, at spælarnir eru til reiðar at taka ein nýggjan fund við okkum, har teir kunnu hoyra um okkara bjargingarætlan, sigur stjórin í Frem, Hans Hermannsen til DR. Frem manglar umleið eina miljón krónur, men bæði viðhaldsfólk og lokala vinnulívið í Valby hava teir seinastu tvær vikurnar gjørt eina stóra innsavnan, í einari roynd at bjarga Frem undan at fara á húsagang.

- Her koma nógvar góðar upphæddir inn á bók hvønn dag, so útlitini eru góð. Tað eru eisini mong vinnulívsfólk, sum enn hugsa um at fara inn og hjálpa okkum, greiðir Hans Hermannsen frá. Hann staðfestir, at leiðslan ætlar at stríðast til tann seinasta vónin er brostin. Hermannsen sigur seg skilja støðuna hjá Frem-spælarunum. - teir hava jú spælt gratis í tríggjar dystir, staðfestir hann.

# Oros skal venja Team-Klaksvík

**Stórskjúttin hjá KÍF skal komandi árið virka sum spælandi venjari hjá Team-Klaksvík**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Team-Klaksvík spældi í fjør sítt fyrsta ár í næst bestu hondbóltsdeildini, og tað gekk ikki verri enn ilt.

Men í felagnum hava tey tó nógv størri mál enn sum so. Hóast onkur kanska hevur ypt øksl eftir felagnum, sum í fleiri mátar var eitt útbrot frá Stjørnuni, so hevur leiðslan alla tíðina havt sum mál, at liðið skal upp í fremstu deildina, og nú verður enn eitt stig tikið á tí leiðini.

Fríðin Ziskason, formaður í Team-Klaksvík, váttar fyri Sosialinum, at felagið hevur gjørt avtalu við Damir Oros, um at hesin skal vera spælandi venjari hjá felagnum komandi kappingarár.

Damir Oros hevur gjørt nógv um seg hjá KÍF seinnu árini. Støðugt hevur skotsterki bakspælarin verið millum bestu málskjúttarnar í landinum, og eina ferð er hann eisini kosin ársins spælari í føroyskum manshondbólti.

- Vit ætla okkum avgjørt upp í bestu deildina. Hóast vit upprunaliga vóru fleiri í eldra endanum, sum mest hugnaðu okkum við felagnum, so eru eisini fleiri evnaríkir spælarar um at búnast. Hesir eru nú eisini eitt ár eldri, og tað er okkara vón, at vit við Damir Oros hava fingið okkum ein venjara og spælara, sum kann vera við til at lyfta okkum móti toppinum í næst bestu deildini, sigur Fríðin Ziskason.



*Kann Damir Oros hjálpa klaksvíkingum við at røkka málinum um uppflyting, verður botnsessurin í Atlantic Airways-deildini veruliga nakað, sum feløgini vilja berjast fyri at sleppa undan*

# Startrøðin á fjarðastevnu

**5-mannafør, dreingir**

| | |
|---|---|
| 4 | Firvaldur |
| 5 | Jallurin |
| 6 | Havfrúgvin |
| 7 | Royndin Fríða |
| 8 | Junkarin |
| 9 | Tjaldrið |
| 10 | Blikur |
| 11 | Teistin |
| 12 | Kollur |
| 13 | Ritan |

**6-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 6 | Romvlvs |
| 7 | Hvessingur |
| 8 | Sølmundur |
| 9 | Gongurólvur |
| 10 | Páll Fangi |
| 11 | Jarnbardur |

**5-mannafør, gentur**

| | |
|---|---|
| 6 | Hvassi |
| 7 | Falkur |
| 8 | Firvaldur |
| 9 | Jallurin |
| 10 | Havfrúgvin |
| 11 | Sílið |

**5-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 7 | Ritan |
| 8 | Frúgvin |
| 9 | Erla Kongsdóttir |
| 10 | Hvassi |
| 11 | Blikur |

**6-mannafør, menn**

| | |
|---|---|
| 4 | Hósvíkingur |
| 5 | Sundabáturin |
| 6 | Rádni |
| 7 | Gongurólvur |
| 8 | Tvøråbáturin |
| 9 | Riddarin |
| 10 | Smyril |
| 11 | Skúgvur |
| 12 | Jarnbardur |
| 13 | Fortuna |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Árnfirðingur |
| 8 | Ørvur |
| 9 | Argjabáturin |
| 10 | Knørrur |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 8 | Klaksvíkingur |
| 9 | Eysturoyingur |
| 10 | Ormurin Langi |